# Eldraráðið 2026 – 2028

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 2 |
| Tíð: | 10. februar 2026 kl. 13.00 – 16.00 |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Annemi Joensen, forfólk, Leivur Hansen, næstforfólk, Johan Carl Dam, nevndarlimur, Bergljót av Skarði, skrivari, Marjun Poulsen, kassameistari, Marin Rasmussen, varalimur, Lissi Hansen, varalimur, og Did Nicolaisen, varalimur.

**Ikki møtt:**

**Fundarskrá:**

1. Val av orðstýrara
2. Góðkenning av síðstu fundarfrásøgn
3. Kommandovegur millum eldraráðið og Býráðið
4. Møguligt samstarv við Heilsu- og umsorganartænastuna
5. Mál at seta á skrá til fund við Heilsu- og umsorganarnevndina 12. februar 2026
6. Ymiskt

<u>AD 1 Val av orðstýrara</u>

Lissi vald til orðstýrara

<u>AD 2 Góðkenning av síðstu fundarfrásøgn</u>

Fundarfrásøgn góðkend.

<u>AD 3 Kommandovegur millum eldraráðið og Býráðið</u>

Forkvinnan hevur kannað, hvønn vit eiga at venda okkum til í Býráðnum. Tað er Heilsu- og eldranevndina umvegis Heilsu- og umsorganarfyrisitingina. Kontaktpersónur: Guðrun Maria Mortensen.

AD 4 Møguligt samstarv við Heilsu- og umsorganartænastuna

Bygnaðarbroytingar fara í løtuni fram í Heilsu- og umsorganartænastuni, broytingarnar fara at verða lagdar fyri Eldraráðið. Størsta avbjóðingin í løtuni er vantandi arbeiðsmegi, nú ið talið av eldri veksur so skjótt. Tosað varð um, hvat ið kommunan kann gera í hesum sambandi. Heilsuskúlin í Suðuroy verður ikki nógv brúktur av norðoyingum, kanska okkurt kann gerast við tað.

AD 5 Mál at seta á skrá til fund við Heilsu- og eldranevndina 12. februar 2026

Av tí at bert hálvur tími er settur av til fundin gjørdu vit av at senda bræv við málunum til nevndina frammanundan. Vit tosaðu um hesi viðurskifti at leggja fyri Býráðið: *Avsláttur* í FITNESS, hví bara geva gomlum avsláttur í einum av fleiri støðum? Tá ið *Stórabrekka* letur upp, skula Ellisheimið og sambýli lata aftur, hví er so, hóast pláss ikki verður fyri øllum? Tað má vera gjørligt at gera *fjarlestur,* so at fólk norðanfyri Suðuroyafjørð fáa gingið í Heilsuskúlanum, eigur at verða framt í samstarvi við Kommunufelagið.

AD 6 Ymiskt

Tosaðu um

- at skipa fyri kunningarfundi í TILHALDINUM.
- at fara undir at leggja eldradagin til rættis í góðari tíð
- at leggja kunning út á FB vangan, til tess at vera sjónlig

Fundur lokin klokkan 16.00

Tórshavn 10. februar 2026

Bergljót av Skarði, skrivari

**Góðkent:**

| Annemi L. Joensen | Leivur Hansen | Bergljót av Skarði | Marjun Poulsen |
|---|---|---|---|
| forfólk | næstforfólk | skrivari | kassameistari |

Jóhan Carl Dam

nevndarlimur